Kularrøtur @ Kambsdali

Leygardagin kl. 17.00 kann øll familjan fara til stórt tiltak á Kambsdali.

Kulir sangir, dansigentir og myndashow.
Absalon Árgarð og stuttligu dukkudreingirnir Fjaðrarok og Nikláí.
Føroyskar barnastjørnur, sum syngja og spæla uppá ljóðføri.
Og Trølla Pætur verður har...... næstan øll vera har!



Atgongumerki á 65 krónur fáast í forsølu á Statoil í Havn, Saltangará, Skálabotni, Leirvík og í Klaksvík.

KULARRØTUR eisini á heimasíðuni:
www.pegasus.fo

Jeepur til sølu

Honda CRV. Jeepur, 2 ára gamal til sølu fyri kr. 135.000.

Tlf. 371103 ella 221469

PRENT?

... troyttur av tokutalu og tilboðum, ið ikki halda, spyr ...

Spf.
HESTPRENT
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

Bahá'í samfelagið í Tórshavn

Miðstøðin í Gundadali

Opið hvørt fríggjakvøld.
Samkoma kl. 20

»…ljósið í einum góðum lyndi ber av ljósi sólarinnar og ljóma hennara… Á hesum er æra og dýrd heimsins grundað…«

Bahá'i skriftir
www.bci.org/bahai.fo

JÄSPI **KETLAR**

Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu

Bæði dupultir og einkultir

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sløkki- og neyðútgerð

- Brannslangir
- Slanguvognar
- Eldsløkkjarar
- Brannteppir
- Forbindsskáp
- Børir

Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:

Skrásetingar-nr. P/F 2385, **P/F Sea Freeze, 350 Vestmanna.**

Nevnd:
Farin úr nevndini: Dánial Jákup Frí›álvur Andreasen, 350 Vestmanna (forma›ur), Tummas Christophersen, Mi›alsbrekka, 350 Vestmanna, Henry Gerhardt Kristoffersen, 350 Vestmanna og Samuel Jakob Petersen, 340 Kvívík.
Innkomin í nevndina: Leif Abrahamsen, Klokkaragøta 25, 100 Tórshavn (forma›ur), Kalli Vá›klett, Bøgøta 23, 700 Klaksvík og Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, 700 Klaksvík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Tummas Christophersen, Mi›alsbrekka, 350 Vestmanna.
Innkomin sum stjóri: Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, 700 Klaksvík.
Grannsko›ari:
Farin frá sum grannsko›ari: P/F Grannsko›aravirki› Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannsko›ari: P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 11. apríl 2000

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:

Skrásetingar-nr. P/F 2429, **P/F Ocean Perch, 350 Vestmanna.**

Nevnd:
Farin úr nevndini: Petur Ovild Sivertsen, 460 Nor›skáli (forma›ur), Regin á Rógvi, 350 Vestmanna og Bjørg á Rógvi, 350 Vestmanna.
Innkomin í nevndina: Leif Abrahamsen, Klokkaragøta 25, 100 Tórshavn (forma›ur), Kalli Vá›klett, Bøgøta 23, 700 Klaksvík og Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, 700 Klaksvík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Bjørg á Rógvi, 350 Vestmanna.
Innkomin sum stjóri: Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, 700 Klaksvík.
Grannsko›ari:
Farin frá sum grannsko›ari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannsko›ari: P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 11. apríl 2000

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 2964

Navn: P/F Føroya Lívstrygging
Adressa: Kopargøta 1, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 18.02.2000
Vi›tøkudato: 18.02.2000
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Vinnumálast‡ri› v/ Finnboga Arge, landsst‡rismanni, Tinganes.
Nevnd: Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrø› 5, 100 Tórshavn (forma›ur), Ey›bjørg Kass, Álvastígur 5, 100 Tórshavn, Súsanna Sørensen, Berjabrekka 55, 100 Tórshavn og Poul Hansen, Áarvegur 1, 100 Tórshavn.
Stjórn: Tummas Theodorsson Eliasen, 650 Toftir.
Tekningarreglur: Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av tveimum nevndarlimum saman ella einum nevndarlimi saman vi› stjóranum ella av 2 stjórum saman.
Grannsko›ari: : P/F Grannsko›aravirki› Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn og P/F Rasmussen & Weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2000 - 31.12.2000
Endamál: Endamál felagsins er at reka lívstryggingarvirksemi og anna› virksemi í hesum sambandi.Í felagnum kunnu teknast øll sløg av lívs- og eftirlønartryggingum og persónstryggingum. Felagi› kann eisini yvirtaka nevndu sløg av tryggingum í endurtrygging.

Skráseting Føroya tann 11. apríl 2000

Kristin Balle

---

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

K@T@-hornið

Nr. 5 · hósdagur 13. apríl 2000 · 74. árgangur

Tíðindablaðið Sosialurin, Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
Blaðstjórn: Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.

Bla›stjórn

Steinbjørn í Dali

Finn Jensen

KT-útbúgvingar í Føroyum:

Setri› til dystin fús

– Ta› er avgerandi ney›ugt fyri menningina av føroysku KT-vinnuni at hava útbúgvi› fólk, eisini á universitetsstigi. Vi› at menna KT á fró›skaparsetursstigi fáa vit kombinera› hægri lestur, gransking og vinnulív, sigur Hans Pauli Joensen, sum er lei›ari á Náttúruvísindadeildini á Fró›skaparsetrinum

Fyrst var hon har - telduútbúgvingin. Vi› gó›ari megi, tí tvey vísindafólk tóku sær av henni. Seinni sansa›i at búskaparliga og ta› merktist eisini á Náttúruvísindadeildini. Vísindafólkini søgdu seg úr starvi, og sí›ani hevur telduútbúgvingin ligi› í dvala, meiri ella minni.

Men, nú sær út til, at útlit eru fyri, at gongd kemur á aftur.


Hans Pauli Joensen, lei›ari á Náttúruvísindadeildini á Fró›skaparsetrinum

Framhaldslestur í teld

Ta› hevur ikki gjørt nakran á Setrinum bilsnan, at teld er vor›i› so t‡dningarmikil partur av samfelagnum vit liva í.

Fyri meiri enn tíggju árum sí›ani setti Náttúruvísindadeildin tvey fólk í starv, vi› tí fyri eyga, at taka sær av at skipa eina universitetsútbúgving í teldufrø›i.

Úrsliti› gjørdist ein 3 ára »Bachelor of Science« (stytt BS) útbúgving í teldufrø›i og tey fyrstu prógvini av hesum slagnum vóru útskriva› í 89.

So kom kreppan og eins og restin av samfelagnum fekk eisini Fró›skaparsetri› ein dyggan undir vangan, sum teir nústa›ni eru vi› at koma seg eftir.

Og sleppur Hans Pauli Joensen at hava seinasta or›i›, so er einki at ivast í, at Náttúruvísindadeildin aftur fer undir skipa›a telduundirvísing. Í heyst.

Hægri vitanarstig

– Eg haldi, at ta› er avgerandi ney›ugt fyri menningina av føroyskari KT-vinnu, at vit aftur fara undir at úbúgva KT-fólk á Fró›skaparseturstigi, sigur Hans Pauli.

Hann vísir á, at ta› - uttan at taka naka› frá teldustø›ingaútbúgvingini á Handilsskúlanum - er ney›ugt vi› eini hægri útbúgving í teld, sum klekir fólk, sum eru før fyri at hugsa á einum hægri »abstraktións«-stigi. Mi›a› eigur at ver›a eftir at útbúgva fólk heilt upp á Ph.D.-stig. Ta› vilja ver›a fólk vi› teimum hægru útbúgvingunum, sum kunnu st‡ra og taka initiativ í samband vi› størri verkætlanir. Men sjálvsagt ver›ur tørvur á fólki vi› øllum útbúgvingarstigum

– Ta› ver›ur ikki talan um kapping millum okkum og Handilsskúlan. Heldur tvørturímóti. Okkara útbúgving gevur t. d. teldustø›ingum møguleika at halda fram á Náttúruvísindadeildini, og ta› eigur at geva ávísar fyrimunir, heldur Hans Pauli.

Hann leggur afturat, at telduútbúgvingarnar á Setrinum eru ví›ari útbúgvingar, sum í ávísum førum byggja á teldustø›ingaútbúgvingina hjá Handilsskúlanum, so heldur enn at taka av teirra grundarlagi, ver›ur setri› annar parturin av útbúgvingarlei› næminganna.

UMMS vil hava fer› á

Tá arbei›sbólkurin fyrireika›i teldustø›ingaútbúgvingina, sum nú er í gongd á Handilsskúlanum, kom hann eftir, at ta› var tørvur á eini útbúgving, sum fer ví›ari enn ta›, sum Handilsskúlin kann bjó›a.

Undirvísingar- og mentamálast‡ri› tók tilmæli til sín og heitti á Fró›skaparsetri› um at arbei›a vi› at samskipa BS-útbúgvingina í teldufrø›i vi› teldustø›ingaútbúgvingina á Handilsskúlanum, og ta› arbei›i› var li›ugt í fjør.

Sí›ani er Setri› fari› ví›ari og hevur gjørt eina n‡ggja útbúgving, sum teir kalla BS í kunningartøkni, og eisini hon er ætla› sum eitt framhald av teldustø›ingaútbúgvingini, men kortini ø›rvísi enn frø›ingaútbúgvingin.

Frø›ingaútbúgvingin er heiltí›arlestur, me›an BS í kunningartøkni ver›ur ta›, sum ver›ur kalla› »opi› setur«, ella á donskum »åbent universitet«.

Hetta merkir í stuttum, at næmingarnir, umframt lesturin, hava arbei›i vi› sí›una av. Lesturin er skipa›ur sum hálvtí›arlestur, og hugsanin er, at næmingarnir annars eru í arbei›i hjá eini fyritøku.

Hans Pauli Joensen ber ikki ótta fyri, at hetta kann hava ringa ávirkan á lestrarhugin. Heldur tvørturímóti.

– Eg rokni vi›, at vinnan fer at fáa gagn av eini slíkari útbúgving og ta› fer Setri› so avgjørt eisini, tí vit fáa samband vi› vinnuna m.a. á henda hátt.

Samstarv vi› útlendskar stovnar

Hans Pauli Joensen grei›ir frá, at ætlanin í fyrsta umfari er at seta ein persón at taka sær av útbúgvingunum í kunningartøkni. Stovnurin hevur í tí sambandi søkt eftir einum vísindaligum starvsfólki vi› fortreytum at undirvísa og granska í teld.

– Men ta› ver›ur ikki bara hesin, sum kemur at hava fyrilestrarnar, tí ein partur av arbei›suppgávuni er gransking og tí ver›a ikki stundir til undirvísing burturav. Ta› fara vit ætlandi at samstarva vi› útlendsk universitet og vi› føroysku KT-vinnunum, sigur Hans Pauli Joensen.

Um útbúgvingin ver›ur til naka› er sjálvsagt ein játtanarspurningur. UMMS hevur fingi› umbøn frá Setrinum um serstaka játtan, men svar er ikki komi› enn.

sveinur@sosialurin.fo

Smátí›indi:

Apple opna lykilin til MacOS X

Eins og fyritøkan Linux, hevur Apple valt at almannakunngera ta› teir rópa keldukotuna til n‡ggju st‡risskipanina, MacOS X, i› nevnist "Darwin".

MacOs X er ein sonevndur Open Source platformur, i› ikki einans kemur at rigga vi› Macintosh teldum, mein eisini á Intel-basera›um Windows teldum. Hetta merkir, at Microsoft nú fær har›a kapping til sjálvt kjarnuforriti› hjá fyritøkuni, Windows st‡risskipanina.

Apple hevur avgjørt at almannakunngera keldukotuna í tí vón, at forritarar og mennarar kring allan heimin betur kunnu gera forrit til skipanina.

Í løtuni finst n‡ggja st‡risskipanin einans sum ein fyribils beta-útgáva uttan grafik. Men longu nú er víst, at tann lidna vøran kemur at hava eina rúgvu av n‡ggjum ambo›um, sum geva mennarum kring heimin ein møguleika at gera n‡ggjar loysnir til MacOs.

N‡ggjur netleitari frá Microsoft

Kreppurakta fyritøkan Microsoft, sum júst er dømt fyri at hava missn‡tt einkarrættarligu stø›u sína, vi› millum anna› leitaranum Internet Explorer, er nú komin út vi› eini uppdatering av leitaranum. T‡sdagin 11. apríl var dagurin, har útgávan 5.5 gjørdist veruleiki, tó bert sum ein beta royndarútgáva. Ein betaútgáva er ikki til keyps, men bert ætla› til royndarkoyring hjá kundum, forritarum og serligum Microsoft partnarum.

Harvi› fingu teir hjá Netscape bert loyvi til at vera einsamallir vi› teirra n‡ggja netleitara, útgávu 6, í tveir dagar, á›renn fyritøkan Microsoft aftur fekk leiklutin sum teirra ke›iligasti kappingarneyti.

Millum n‡ggju hentleikarnar í Microsoft Explorer 5.5, er stu›ul til 128 bit kryptering, sum heild ein skjótari flutningur og betri útskrivingarmøguleikar. Men í mun til Netscape 6 er talan bert um eina uppdatera›a útgávu, ikki eina n‡ggja útgávu. Harvi› er Explorarin í veruleikanum vor›in eitt heilt ættarli› eldri enn kappingarneytin

Ókeypis telefonir frá Ericsson og Nokia

Alnet n‡tarar kring allan knøttin hava seinastu dagarnar fingi› teldupost, har Nokia og Ericsson bjó›a ókeypis telefonir, um teir senda brævi› ví›ari. Hetta er nú avdúka› sum fupp.

Microsoft fingi› ein dato

Dómarin í heimsgitnu antitrust rættarsakini móti Microsoft hevur nú ásett 24. mai sum byrjunardag í revsingini av Microsoft.